Reyni Service selur bilar til Fæøernes Kommando:

# Níggju nýggir hernaðarbilar

**Hósdagin var móttøka í stóru framsýningarhøllini hjá Reyni Service í Hoyvík. Orsøkin var, at teir lótu níggju nýggjar Toyota LandCruiser til Færøernes Kommando í Mjørkadali**



Frá Færøernes Kommando vóru teir væl mannaðir, tá teir komu at heinta níggju spildurnýggjar Toyota LandCruiser hósdagin

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Tey seinastu meira enn 40 árini, ið eru liðin síðan hernaðarbilar av fyrstan tíð komu til støðina í Mjørkadali, hava teir verið keyptir beinleiðis gjøgnum danska herin. Tá teir skulu seljast, verða teir sendir av landinum aftur.

Eftir fyrireikingar í umleið eitt ár hava Reyni Service í Hoyvík og Færøernes Kommando í Mjørkadali gjørt avtalu um keyp av nýggjum bilum, tænastu og viðlíkahaldi av bilunum. Hetta er fyrstu ferð, at ein føroysk bilasøla selur bilar til Færøernes Kommando. Hósdagin var móttøka í stóru framsýningarhøllini hjá Reyni Service, har umboð fyri fjølmiðlarnar og ymiskar stovnar vóru boðin við. Móttøkan var í sambandi við, at Reyni Service lótu níggju teir fyrstu bilarnar til Færøernes Kommando. Talan var um myrkabláar Toyota LandCruiser, ið allir vóru eins, einasti munurin var tølini á nummarplátunum.

Fyrst beyð stjórin á Reyni Service, Eivind av Reyni, øllum at vera vælkomin, síðan var kaffi og pinnamatur at fáa. Eivind greiddi frá avtaluni, teir høvdu gjørt við Fæørernes Kommando og um søguna hjá LandCruiser.

Framleiðslan byrjaði í 1951, tá Toyota eftir seinna heimsbardaga fór at gera hernaðarbilar.

Síðan 1956 eru LandCruiser gjørdir í 6 milliónum eindum og seldir í 129 ymiskum londum.

Eftir at eitt umboð fyri Færøernes Kommando saman við einum umboð fyri Reyni Service høvdu stillað seg við hvønn av bilunum, handaði Eivind av Reyni bilarnar til kommandørin á Færøernes Kommando, Jan T. Leisborch. Síðan vórðu allir bilarnir á rað koyrdir út úr høllini.



Stjórin á Reyni Service, Eivind av Reyni, handar bilarnar til kommandørin á Færøenes Kommando, Jan T. Leisborch


Vetrarferðatilboð 14.09.2002 - 10.05.2003
The North Atlantic Link

Danland
2 vaksin og 2 børn við bili
galdandi fra 14.09.2002 - 10.05.2003
Íroknað prísin er: Ferðin aftur og fram við Norrønu í 4-koyggjukamari við WC/bað.
Uppihald omanfyrinevnda dagatal á nevndu frítíðardeplum. Danland hevur eisini líknandi deplar aðrastaðni í Danmark.
Ebeltoft (myndin) · Blokhus · Hirtshals
4.995,- gisting 7 nætur
Hesir eru í Søndervig, Fanø, Rømø, Bork Havn, Lemvig, Skagen, Øster Hurup, Fåborg, Rudkøbing, Østersøen - Møn, Blåvand og Bornholm.

Langt vikuskifti
Shetland Cruise
hósdag til mánadag
Íroknað prísin er: Ferðin aftur og fram við Norrønu í einum av nevndu kamarssløgum. Fyri ShetlandsCruise 2 nætur og vikuferð 9 nætur v. morgunmati á einum av nevndu gistingarstøðum.
Á vallaraheiminum er ikki íroknaður morgunmatur. Á hotellunum og fyri privata gisting er innivist í dupultkamari, meðan á vallaraheiminum í felagsrúmi. Fyri børn, einakamar ella eykasong eru aðrir prísir galdandi. Nærri fæst at vita á skrivstovu okkara.

Shetland Cruise

| | 4-koyggjuk. við WC/bað | 2-koyggjuk. við WC/bað |
|---|---|---|
| Grand-/Queens Hotel | 1.550,- | 1.730,- |
| Shetland-/Lerwick Hotel | 1.690,- | 1.870,- |
| Herrislea House Hotel | 1.550,- | 1.730,- |
| Privat Gisting | 1.280,- | 1.460,- |
| Vallaraheim | 1.010,- | 1.190,- |

Pakkaferð við innivist í 9 dagar

| | 4-koyggjuk. við WC/bað | 2-koyggjuk. við WC/bað |
|---|---|---|
| Grand-/Quenns Hotel | 4.100,- | 4.280,- |
| Shetland-/Lerwick Hotel | 4.940,- | 5.120,- |
| Herrislea House Hotel | 4.100,- | 4.280,- |
| Privat Gisting | 3.220,- | 3.400,- |
| Vallaraheim | 2.030,- | 2.210,- |

Shetland
Easterhoull Chalets
1 vika í summarhúsi
2 vaksin og 2 børn við bili

| | 4-koyggjuk. við WC/bað |
|---|---|
| Hús við 2 rúmum | 4.940,- |
| Hús við 3 rúmum | 5.630,- |

Pakkaferð við gisting á hotelli
2 ferðandi í bili, gisting 7 nætur á Hotel Hanstholm
fyri hvønn 3.290,-
galdandi frá 14.09.2002 - 10.05.2003

2 fyri 1 ferðist tvey - gjaldið fyri ein!
galdandi til og við 1. mai 2003
Ferð fyri tvey vaksin við bili Tórshavn - Hanstholm og aftur í 2 koyggjukamari við WC/bað
2.990,-

2 fyri 1 ferðist tvey - gjaldið fyri ein!
galdandi til og við 1. mai 2003
Ferð fyri tvey vaksin við bili Tórshavn - Lerwick og aftur í 2 koyggjukamari við WC/bað
2.200,-

e-mail: booking@smyril-line.fo · www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00




# Tey eru IN við Norðskála



*Fríða Midjord í »ekslusivum« umhvørvi í sera hugnaligu matstovuni Café-IN við Norðskála*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Nýggj matstova lat í vikuni upp við Norðskála. Til ber at fáa alt frá grillmati til búffar við víni afturvið undir somu lon**

Í BÝIN
*Edvard Joensen*

**við Norðskála:** Tá tey fara út at fáa sær ein bita við Norðskála, fara tey í IN. Nýggju caféina, sum mánadagin lat upp beint norðan fyri brúnna.

Í nýggju caféini fæst alt frá grillmati til fínar búffar við øllum tilhoyri. Opið er frá klokkan tíggju fyrrapartin til klokkan 11 á kvøldi. Um middagleitð ber til at keypa døgurða. Dagsins rætt. Matstovan, har borðreitt verður við búffum, hevur fult skeinkiloyvi. Har verður tó ikki latið upp fyrr enn klokkan 17 seinnapartin.

Fríða Midjord, sum eigur Café-IN við Norðskála, býður vælkomin, tá vit koma inn. Tað regnar uttan fyri, og væl av vindi er. Tað rekur naka undir brúnni, Undan ættini, so tað sær ikki so galið út hiðani úr vindeyganum. Útsýnið er gott, og til ber at fylgja við tí, sum fer norður gjøgnum Sundalagið. Í dag eru tað bara nakrar æður, sum liggja og andøva í streymkantinum.

Hølið er ljóst og rúmligt. Lætt at koma inn í. Bygt sum ein grillbarr við diski, har matskráin er lýst við myndum omanfyri. Køkurin er í sama rúmi, so Fríða, sum stendur við komfýrin, sær, nær fólk koma inn.

Hon fer yvir til diskin og setir tvey krúss undir kaffimaskinuna. Fyllir tey við espresso, og vit fara so inn í matstovuna í norðara enda at práta.

– Hetta er ein avloysing ella víðkan av grillini Centrum, sum vit høvdu frammanundan. Men tað var líkasum, at nakað manglaði, greiðir Fríða Midjord frá.

So nú er Centrum stongt, og virksemið flutt og víðkað her í nýggja bygninginum.

Fyrstu dagarnar hevur undirtøkan bara verið í lagi, letur hon at. Fólk kenna sjálvandi grillvørurnar frá Centrum, og tað, tey høvdu har, er eisini at fáa her í nýggja handlinum, greiðir Fríða Midjord frá.

Talan er um alla vanligar grillvørur. Men so er tað døgurðamaturin, dagsins rættur, sum fæst fyri 35 ,- krónur. Hann verður seldur frá umleið klokkan hálvum tólv, til hálvgum tvey ella so. Og tí hava fólk longu funnið útav.

Í tí partinum av bygninginum, har grillin er, eru sett borð upp, so sitast kann og eta tað, keypt er.

Sum nakað heilt nýtt her norðurin er verulig matstova eisini latin upp. Her er heilt annar stílur enn í syðra partinum, har grillmatstovan er.

– Vit vænta eisini, at tað verða onnuur fólk, sum koma her, sigur Fríða Midjord. Her er meira »ekslusivt«, um vit kunnu siga so. Myrk panel. Mahogni diskar og viftur undir loftinum. Tú kennir teg líkasum komnan í gomul kolonilond.

– Tað er ikki ætlanin at hava hendan partin í sambandi við grillina yvirhøvur, greiðir Fríða Zachariassen frá, tá vit hava set okkum í eina av polstraðu sofunum. Líkasum í einum bási, har fýra fólk fáa sitið við eitt borð. Skilaveggur er ímillum, so tú situr fyri teg sjálvan og verður ikki órógvaður av teimum, sum sita aftanfyri. Ella øvugt. Her er pláss fyri umleið 30-35 fólkum inni.

– Her fara vit at bjóða fólki at koma at fáa sær ein betri bita. Í fyrsta lagi hava vit valt ikki at hava so øgiliga stóra matskrá. Tríggjar ymiskar búffar við tilhoyri, greiðir Fríða frá. Umframt er so fult skeinkiloyvi til hendan partin.

Longu nú hava fólk verið og roynt staðið, og tey eru nøgd. Trý jolaborðhald eru eisini longu umbiðin.

Okkurt smávegis er eftir at gera soleiðis rundanum, hóast latið er upp. Eitt nú manglar skelting enn, men tað verður eitt tað fyrsta, nú verður farið undir. Í fysta lagi á bygninginum sjálvum, men kanska eisini eitt sindur burturfrá, soleiðis at tann, sum kemur koyrandi framvið, sær, at her er komið nýtt matstað. Og tey koyra nógv um brúnna við Streymin hvønn einasta dag.



*Café-In er býtt í tveir partar, Tann ljósi og rúmligi, har eitt nú grillbarrin er, er opin allan dagin, meðan »fínara« matstovan bert er opin um kvøldið*
*Mynd: Edvard Joensen*


TRYGDARÚTGERÐ
BJARGINGARÚTGERÐ
SLØKKIÚTGERÐ

TRYGDARÚTGERÐ
Trygdarhjálmar
Húgvur til hjálmar
Kvalitets trygdarskógvar
Ymisk hoyrivernd
Støvmaskur v.m.
Trygdarbrillur
Skiltir / Ferðslutalvur,
Alt innan avmerkingarútgerð
Hondreins
Handskar til øll endamál !

BJARGINGARÚTGERÐ
· Bjargingarbátar
· Bjargingarkransar
· Ljós og battarlir til bjargingarbeltir
· Neyðrakettir
· Hondbluss
· Pioner plastjollur - nógv model
· Leysamotorar - páhengsmotorara

SLØKKIÚTGERÐ
· Eldsløkkjarir
· Brandteppir
· Roykalarmar
· Brandslangur
· Spulislangur
· Koplingar og slangubond
· Vognar til brand og spulislangur
· Ymisk strálirør
· Slangur til øll endamál !

TILBOÐ

| | |
|---|---|
| Luksus termoketildraktir | kr. 598,- |
| Regndraktir 100% vatntættar | kr. 598,- |
| Trygdaskógvar | kr. 598,- |
| Hoyrivernd v/Fm-radio | kr. 798,- |

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla · Smásøla · Umboð
Tel. 315600 - Fax 318008